## Brúka nógv blóð

Sjúklingar á donskum sjúkrahúsum fáa nógv meiri blóð enn sjúklingar á sjúkrahúsum í øðrum londum. Kristeligt Dagblad skrivar, at í 2008 brúktu tey donsku sjúkrahúsini 67 blóðpakkar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Til samanberingar brúktu tey norsku sjúkrahúsini 42 blóðpakkar, tey svensku 51 og tey sponsku bara 27 fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Jørgen Georgsen, yvirlækni á blóðbankanum í Odense, sigur við Kristeligt Dagblad, at tað besta var, at blóðnýtslan í Danmark var um 50 pakkar fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Hann heldur, at ymsar mannagongdir í sjúkrahúsverkinum eru orsøk til ta stóru blóðnýtsluna.



## Málið ov gamalt

Alt bendir á, at amerikanska ákæruvaldið fer at sleppa málinum ímóti donsku kvinnuni Camilla Broe, sum var ákærd fyri at hava smuglað 106.000 ecstasytablettir til USA. Málið var fyri í rættinum í Miami í nátt, og har kom dómarin til ta niðurstøðu, at ákæruvaldið skal sleppa ákæruni, tí málið er ov gamalt. Amerikanski verjin hjá teirri 42 ára gomlu donsku kvinnuni fer nú at royna at fáa hana leysa ímóti gjaldi. Verður ákæran ímóti Camillu Broe slept, kann málið fáa eitt politiskt eftirspæl í Danmark, tí fleiri settu spurnartekin við, at løgmálaráðið gjørdi av at útflýggja hana til rættarsókn í USA.

# Nýggja flaggskipið hjá gøtumonnum liðugt um 5 vikur

**- Gongst, sum ætlað, verður klárt at loysa í Skagen um hálvan februar. Vit vænta, at nýggi Tróndur í Gøtu stevnir inn í føroyskan sjógv stutt eftir hálvan februar, um ikki okkurt óvæntað hendir, sigur tekniski leiðarin hjá Varðanum í Gøtu, Dávið Jacobsen**




*Nýggi Tróndur í Gøtu er 81,6 metrar langur og 16,6 metrar breiður og fer at lasta eini 2700 tons. Hann er soleiðis 14 metrar longri enn gamla skipið – og stívliga tveir metrar breiðari*




*Gongst sum ætlað, stevnir nýggja flaggskipið hjá gøtumonnum inn í føroys*

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um ein góðan mánaða ella so stevnir nýggi Tróndur í Gøtu væntandi inn á Gøtuvík.

Skrokkurin er smíðaður í Pólandi, og tað er Karstensens Skibsværft í Skagen, sum ger skipið liðugt.

Dávið Jacobsen, tekniskur leiðari hjá Varðanum í Gøtu, sigur, at sambært upprunaliga sáttmálanum skuldu teir havt fingið skipið longu í august mánaða í fjør, men hetta hevur drigið út.

### Seinastur á lista

Orsøkin er, at skrokkurin var so nógv seinkaður úr Pólandi. Sum skilst, var hetta seinasti skrokkur á listanum hjá skipasmiðjuni í Gdynia, og tað hevur helst havt sína ávirkan, at menn ikki hildu seg hava so nógv at skunda sær til.

Tekniski leiðarin sigur, at síðan skrokkurin kom til Skagen í august mánað í fjør, hevur alt gingið sum eftir ánni, sum hann tekur til.

Dávið sigur, at eftir ætlan og soleiðis, sum arbeiðið gongur nú, verður skipið liðugt um ein mánaða ella so.

Nýggi Tróndur í Gøtu verður 81,6 metrar langur og 16,6 metrar breiður og fer at lasta eini 2700 tons.

Hóast nýbygningurin er heilar 14 metrar longri og stívliga tveir metrar breiðari enn gamli Tróndur í Gøtu, lasta skipini umleið tað sama, men nýbygningurin fer at bera lastina nógv betri enn hin gamli.

Sáttmálaprísurin fyri nýggja skipið liggur um stívliga 230 miljónir krónur, men við ymiskum, sum kemur aftrat, útgerð og reiðskapi fer kostnaðurin helst at tátta í 250 miljónir krónur.

Gamli Tróndur í Gøtu, sum tó ikki er hin elsti í røðini, stevndi fyrstu ferð inn á Gøtuvík hin 12. januar í 1987.

Tað vóru kinverjar, ið keyptu stívliga 20 ára gamla skipið, sum nú fiskar í Kyrrahavinum undir peruanskum flaggi.

### Fer royndartúr

Dávið Jacobsen, sum eisini hevur eftirlitið við byggingini fyri felagið í Gøtu, væntar, at nýbygningurin fer tekniskan royndartúr um einar tríggjar vikur ella so.

Hann sigur, at vísir tað seg tá, at skipið riggar eftir ætlan, verða útgerð, spøl og reiðskapur roynd.

- Gongst, sum ætlað, verður klárt at loysa í Skagen um hálvan februar. Vit vænta soleiðis, at nýggi Tróndur í Gøtu stevnir inn í føroyskan sjógv stutt eftir hálvan februar, um ikki okkurt óvæntað hendir, sigur tekniski leiðarin.

El-Service á Skála hevur gjørt el-talvur og el-instalatiónir til skipið, og Radioservice og Vónin eru eisini veitarar av útgerð og reiðskapi.